Fra:	Fnu
Til:	Umhvørvismálaráðið
Emne:	Hoyringssvar frá FNU viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita).- freist 31. januar 2024
Dato:	30. januar 2024 08:58:30

Til Umhvørvismálaráðið

Hervið verður sent hoyringsskriv frá FNU um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita).

FNU takkar fyri at verða boðið til hoyring av uppskotinum.

FNU fegnast um, at tað saman við innbjóðingini um hoyring, verður nevnt, at endamálið við lógaruppskotinum er, at tað skal bera okkum fram á leið at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi.

FNU staðfestir, at sambært vísindini eru veðurlagsbroytingar í ferð við at henda og tað er vegna CO2 útlátinum hjá mannaættini seinastu 250 árini ella síðani ídnaðarkollveltingin byrjaði. Útlitini eru, at veðurlagsbroytingarnar fara at hótta liviumstøðurnar hjá okkara eftirkomarum og tí er neyðugt, at vit øll gera nakað við hetta beinanvegin.

Ein stórur partur av CO2 útlátinum kemur av, at vit brenna fossila orku. Fyri at steðga hesi gongd er neyðugt at skifta frá at brúka fossila orku til at nýta grøna orku. Og hesum tekur FNU sjálvsagt undir við.

Samstundis vil FNU undirstrika, at vit eiga at órógva náttúruna sum minst, tá orkuútbyggingar verða gjørdar. Eisini skulu munagóðar árinskanningar í mun til djóralív og margfeldi verða gjørdar í góðari tíð áðrenn farið verður undir útbyggingar.

FNU 30. januar 2024